

**Johan Norðfoss:**

# Mundi gingið burtur við koksi

**Á ferð heim úr Bretlandi við eini last av koksi við Gudrun Zoega er Johan við manning við at ganga burtur. Johan er við at taka part av vrakinum av Goðanes upp í 1957. Seinni fer hann við íslendskum trolarum, har manningin tann eina túrin er við at umkomast av tosta**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**9. partur**

Vit vóru farnir úr Leithfjørðinum, tá ið illveður brast á. Veðrið var so ringt, at havnirnar vóru stongdar, og vit sluppu tí ikki inn aftur.

Tá fingu vit ein sjógv, sum kom beint í dekslastina. Skipið lá borðfult í sjógvi og koksi. Koks er eitt sindur hvast, so tað rann ikki lætt av skipinum. Skipið lá bara stilt borðfult. Vit máttu tískil bróta eitt sindur av skansaklædninginum fyri at fáa koksið og sjógvin av dekkinum aftur.

Samstundis fór bjargingarbáturin í knús, og fokkan fór eisini. Vit royndu so at hava vindin aftanfyri tvørs og stríða okkum upp móti Føroyum. Vindurin var nógvur, og sjógvurin var blivin so ringur. Meðan vit stríddust fyri lívinum uppdagaðu vit, at tað var fult av sjógvi frammi í lugarinum. Tað vísti seg, at skipið var farið at leka eisini. So fóru vit at pumpa, og tá ið vit høvdu pumpað eina løtu, typtist dekspumpan frá neðra av køksstøvi. Men motorurin, sum annars ikki hevði fingið spáað langa livitíð, hann gekk merkiliga væl. Men so brotnaði ein vippiarmur til smyrjiapparatið. Tað bar kortini til at at vinda hetta við hond. So mátti ein maður gera hetta. Hann skuldi eisini syrgja fyri at halda lensipumpuna reina, so hon ikki typtist eisini. Við ongari dekspumpu oystu vit eisini úr lugarinum, har nógvur sjógvur var.

Ein maður vant smyrjiapparatið í neðra, ein mátti stýra, og hinir royndu sum frægast at hjálpa til at halda lens.

Mitt í tað heila nú slitnaði róðurketan. So nú lá skipið tvørtur fyri í hesum ringa veðrinum. Róðurketuna máttu vit "fiska" eftir, tí hon lá gjøgnum ein slíra fram við síðunum inn til stýrihúsið. Hetta eydnaðist eisini, so róðrið kundi snøggast so mikið til, at tað kundi nýtast.

Men eina ferð minnist eg, tá ið eg stóð á dekkinum, at eg sá ikki nógva vón fyri mær. Eg bað Várharra taka hond um tey, sum sótu heima og at vera við okkum, sum eg ikki roknaði við fóru at koma heim aftur.

Vit royndu so at koma burtur úr hesum. Tað vísti seg, at løgdu vit skipið uppí, kom meira sjógvur í skipið, men hildu vit hana aftanfyri tvørs var heldur frægari. Nú komu vit spakuliga upp undir land. Hesum stúrdu vit eisini fyri. Ættin var landnyrðingur, og at koma inn móti landi á hesi ættini vistu vit var ikki av tí besta.

Vit høvdu ikki tíð at hugsa um annað enn at stríðast fyri lívinum. Mat hugsaðu vit ikki um, heldur ikki, at vit vóru vátir ígjøgnum. Vit høvdu radiotelefon og høvdu roynt at geva boð frá okkum. Men hesar greiðir vóru eisini farnar, so her gjørdist einki.

## Koma undir land

Beint áðrenn, tað var blivið myrkt hesa náttina, sóu vit eitt ljós. Vit komu til, at hetta var vitin á Akrabyrgi. Glaðir vóru vit. Vit vóru nú komnir móti Sumbiarsteini. Har var vanliga ringur sjógvur. Men nú var hepnið við okkum, og vit fingu tað hampuliga slætt. Vit komu inn vestanfyri Suðuroynna, og her var slætt. Tá lá allur tann russiski sildaflotin undir landi og krokaði. Vit tosaðu um, hvørt vit skuldu fara frá skipinum, tí vit máttu framvegis pumpa. Skipið var næstan vrak. Men vit hildu, at vóru vit komnir so langt, so skuldu vit eisini royna at koma seinasta teinin eisini.

Hesa náttina lógu vit undir Skúvanesi. Tann fyrsta drekkamunnin, eftir at vit vóru farnir frá Leithfjørðinum, fingu vit her.

So fóru vit at royna at koma á Vestmanna við at sigla vestanfyri. Men á leiðini norður eftir slitnaði róðurketan aftur. Tað eydnaðist aftur at fáa hana afturgjørda.

Tá ið vit komu móti Koltur lá tað soleiðis fyri við sjóvarfallinum, at vit kundu fara beina leið á Havnina. Maskinmaðurin fór nú at royna at fáa radiogreiðirnar at virka, og tað fekk hann. Tá vóru



*Bilur hjá Havnar Kolasølu. Her verður sandur koyrdur uppí bilin við nýggjar tøkni. Nevniliga við transportbandi, sum snillingur Fritleif Johannesen, pápa Birgar, hevði riggað til*



*Gudrun Zoega kundi eins væl verðið lagnan hjá Johan. Hon var eyðkend, tí stýrihúsið var aftanfyri aftaru mastrina*